# Dagsskrá og fundarfrásøgn frá skúlastýrisfundi í skúlanum á Argjahamri

| Dagur: 7.oktober<br>Tíð:kl 16.00 – 18.00 | | Luttakarar: Allan, Vivian, Súsanna, Rudi, Bjørghild, og Marjun<br><br>Ikki møtt: Bergun | |
|---|---|---|---|
| **Dagsskrá** | | **Frásøgn**<br>*Samandráttur av kunningini/umrøðuni, niðurstøða/avgerð, ásetan av ábyrgdarhava og møgulig freist.* | **Miðlan** |
| 1. | 1. Fundarfrásøgnin | | |
| 2 | 2. Skúlagarðurin aftursvar og ætlanir | Allan hevur sett seg í samband við Jákup Dam, formann í Teknisku nevnd og Boga Jacobsen og boðið teimum til fundar um uttanduraøkið hjá skúlanum.<br>Allan hevði rykt eftir svarið og fekk síðan tað aftursvar at umboðini frá Mentamáladeildini Katrin Ellingsgaard og Sigurð Vang kundu koma á í seinnu helvt av november ella desember.<br>Marjun skal senda umsókn inn til komandi fíggjarár um at fáa burtur av játtanini til skúlagarðar fyri komandi fíggjarár<br>Húsaumsitingin hevur verið úti og hugt eftir tí spæliøkinum sum er gjørt og siga tey at trygdin á økinum skal gerast betur. Vatnið sum rennur í økinum má leiðast burtur, so hylurin sum er framman fyri grunddeildina, má hava betur frárensl. | MH |
| 3. | Stórflokkar<br>a) Hví vit eru byrjað við stórflokkum<br>b) Eftirmetingararbeiði | Royndirnar niðri á Argjum við flokkum sum vóru býttir sundir soleiðis:<br>a) Eldri parturin av bygdini í ein flokk<br>b) Hamarin og Kongavarða í ein flokk.<br>Hetta riggaði ikki altíð væl, tað vísti seg serligar avbjóðingar at fáa eina flokseind millum Hamaran og Kongavarða<br>Næmingatalið og tvílæraraskipanin, hevur ligið sum á einum støði har pláss hevur verið fyri triðja lærarnum, sum má koma floksstiginum til góðar.<br>Næmingahópurin, sum byrjar í 1.flokki er broyttur, so at ein einsamallur lærari ella námsfrøðingur hava avbjóðingar at klára ein hóp á 20 næmingar.<br>Broyttir karmar og at krøvini til at toymissamstarvið millum lærarar og námsfrøðingar hevur verður styrkt við teimum nýggju hølisumstøðunum.<br>Starvsfólk skulu nú fyrireika í felag, fremja og eftirmeta undirvísingina áhaldandi. | MH |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | Lærarayrkið er eisini ein meirstaralæra. Ymiskleikin í toymissamanseting hevur verið ein styrki í toyminum.<br>Fráverur og broyttu næmingahóparnir tola illa at lærarar sum onki kenna til næmingarnar koma inn í yngstu flokkarnar, gott er at starvsfólk sum kenna næmingar og arbeiðsuppgávuna eru til staðar.<br>Ein minni hepin avbjóðingin er, at næmingar kunnu hava eina kenslu av tey vaksnu kanska ikki leggja tey til merkis tí hópurin er so stórur.<br>Foreldur hava torført við at læra onnur foreldur í flokkinum at kenna.<br>Sambondini gerast so nógv, tí ørkmlandi fyri foreldrini.<br>Tað er ein avbjóðing at halda føðingardagar í stórflokkinum.Tað eru gjørdar ymiskar royndir við at halda føðingardagar m.a. bólkar við litum ella gentir fyri seg og dreingir fyri seg.<br>Tað at gera eina dygdargóða eftirmeting er eitt stórarbeiði.<br>Eftirmetingin av skúlan við Løgmannabreyt er júst gjørd av Hans Harryson og er tað heppið at ein uttanífrá ger eina kanninga av øllum pørtum.<br>Kanningin kostaði 200.000,- kr og er ætlanin at aðrir skúlar skulu kannast á sama hátt. Undirvísingarstýrið og Tórshavar Kommuna hava umbiðið hesa kanning.<br>Eftirmeting við teimum eldru næmingunum 4.fl og uppeftir, vísa seg at rigga minni væl við teimum hølisumstøðum vit hava.<br>Lærarar halda tað er sera avbjóðandi at undirvísa í dura opinum, hevur verið áhaldandi avbjóðingin. | |
| 4. | 3. Skúlastýrisval | Tilfarið til skúlastýrisvalið er ikki komið út enn.<br>Kunning í oktober, skúlin ger ein vallista við øllum foreldrum. Listin liggur frammi á skrivstovuni at eftirkanningar hjá foreldrum, fram til uppstillingarfundin.<br>Uppstilligarfundur skal í seinasta lagi hava verið 27.okt. og listin við valevnum klárur 3.nov.<br>Valið er 10.november, í Látrinum. | MH |
| 6 | 4. Kunning | Skýlið er um at verða liðugt og næmingaráðið skal fáa tað handa. | MH |
| 7 | 5. Ymiskt | Avtalan er at vit hittast aftur til uppstillingarfund. | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | Vivian vil fegin hava ein lista til at seta valevnini á<br><br>Tosað bleiv um at hava okkara seinasta fund okkurt hugnaligt stað við onkrum til matna einaferð í november | |